# Kyoto, ST og Føroyar

HERGEIR NIELSEN



Farnar og komandi ístíðir, og aðrar jarðfrøðiligar rembingar av ymiskum slagi fáa vit einki gjørt við. Tíbetur.

Soleiðis hevur tað verið í millardum av árum, har Jørðin hevur hvílt í sær sjálvari í ringrás síni millum aðrar knøttar í sólskipanini.

Men veðurlagið á Jørðini, soleiðis sum okkum dámar tað, við føroyskum veðurlagið her um okkara leiðir, skýggja loft, surk og sirm lýggjar várdagar og heiðin himin kaldar heystardagar, tað er við at broytast, og tað í stórum.

Staðfest er, eisini av teimum stórstu skeptikarunum, at tær stóru árligu veðurlagsbroytingarnar standast av mannaelvdari dálking, og serliga av útláti av veðurlagsgassum.

Veðurlagið er broytt, og útlitini til, at tað broytist enn meira, ja so mikið, at vit at enda ikki ána, um vit eru stødd á himni ella jørð, tey útlitini eru komin heilt uppat okkum, og tey tykjast vera komin fyri at vera.

Okkum nýtist ikki at hugsa um at bjarga jørðini sum klótu, tað makta vit ikki.

Hinvegin kann klótan rista okkum burturav sær, og týna bæði menniskju og tey villini djór her búleikast.

Tað hevur hon gjørt fyrr, og væl ber til, at tað hendur aftur.

Tað, sum vit menniskju tí eiga at leggja okkum eftir, tað er at bjarga okkum sjálvum, meðan tað er gjørligt, og síðsta útkall er við at vera har.

**Ræðandi avleiðingar**

Tað er sligið fast, og eingin ivi er longur um, at vøksturin av vakstrarhúsgassum stendst av mannaávum, og um vit halda fram við sama lag økist hitin við 3-6 stigum komandi hundrað árini, og meiri enn tað á ávísum økjum,

- ísurin í arktis hvørvur, høvini fara at fløða, og oyðimerkurnar fara at vaksa.
- Arktis og Grønland hitna meira og meira,
- um dagarnar brotnaði ein 100 km² stórur ísflaki við Ellesmere Island,
- tá ísurin hvørvur verður minni sólarljós og hiti kastast útaftur í rúmdina,
- og sjálvsstyrkjandi prosessirnar eru farnar í gongd,
- permafrostið í frystu tundraini hitnar og methan kemur út í størri nøgdum,
- methan er 20 ferðir sterkari vakstrarhúsgass enn $CO^2$,
- óðnirnar gerast fleiri og fleiri og hvassari og hvassari.
- Korallrivini í høvunum ganga til grundar av súrum sjógvi,
- ævigi kavin bráðnar á hægstu tindunum,
- norðurlendingar dyrka meis í staðin fyri fóðurrøtur,
- og føroyingar ganga og heinta summardáar á jólum,
- og harmast um at tað aldagamla skerpikjøtið er komi í vanda.

Hetta er gongdin, og hon stendur við og versnar.

**Jørðin broytist til eina aðra planet**

Jørðin broytist heilt einfalt til eina aðra planet, um vit brenna alt tað alt fossila brennievnið, sum er lagra upp í mió. av árum, av eftir einari løtu á okkara døgum.

Samstundis sum Føroyar liggja millum heimsins fremstu lond, tá ið ræður um útlát fyri hvønn íbúgva, hveppa vit okkum við at seta Kyoto-sáttmálan í gildi fyri Føroyar.

Hetta er sjálvandi heilt óskiljandi og fullkomiliga ábyrgdarleyst, siga bæði heimligir og útlendskir veðurlagsfrøðingar við ein munn.

Tá Føroyar liggja fremst millum øll heimsins lond, sum burturav liva av náttúrunnar tilfeingi, átti tað at veri ein sjálvfylgja, at Føroyar skuldu talst millum heimsins fremstu lond at vart náttúrunna.

Men so er ikki, tíverri,

**Brandingin av Føroyum**

Í august í fjør hittust norðurlendsku náttúru- og umhvørvisfelagsskapirnir í Føroyum, har tey við stórari undran kundu staðfesta líkasæluna á umhvørvisøkinum í Føroyum.

Har var í tíðindaskrivi til norðurlendsku limalondini staðfest, at Føroyar vóru einasta norðanland, sum ikki hevði undirskriva Kyoto-protokollina, hóast Føroyar eru eitt av teimum londum í heiminum, sum hevur hægsta útlát av $CO^2$, og at oyggjarnar uttan iva fóru at verða ávirkaðar av veðurlagsbroytingunum.

Hvat Clinton og Blix fara at skriva heim um vita vit ikki, men roknað verður við, at riðilin av tíðindafólki, sum kemur í hølunum á teimum, fer at ansa eftir, at Føroyar hava skipað seg leysar av altjóða umhvørvispolitikkinum, og liggja sum ein rúkandi skorðsteinur mitt í tí reinasta matvørukovanum í Norðurhøvum.

Altjóða umdømi okkara er so í hvussu so er í bráðkomnum vand, um vit billa okkum inn, at vit kunna sita og guva, har guvuforboð er sett í verk av umheiminum.

Tað kostar at gera nakað við hetta málið, og tann kostnaðin rinda vit sjálvi, og tað hava vit lýst í sjálvum uppskotinum.

Hinvegin, so kostar so sanniliga eisini nakað at lata vera við at gera nakað við hetta málið.

Tann kostnaðurin verður ikki roknaður í krónum, men í katastrofum.

***Stórpolitisk átøk móti serfrøðini***

Tað leikar hart á í USA, har tað í gjár kom undan kavi, at poltiska valdið einar 400 ferðir hevur lagt trýst á granskarar um at strika viðkvæmar orðingar í komandi frágreiðingini frá teimum 2.500 ST-veðurlagsserfrøðingunum, sum kemur út í morgin.

Orð sum "veðurlagsbroytingar", "alheims upphiting" og orðingar av líknandi slag, eru illa dámd av politiska valdinum í USA, sum eins og í Føroyum skulkar sær undan teimum framtøkum, sum neyðug eru á hesum øki.

Politiska valdið roynir her at gera seg inn á altjóða óheftu granskingina og roynir at manipulera seg fram til onnur úrslit, enn tey veruligu, sum koma undan kavi í morgin.

Vit í Tjóðveldisflokkinum halda at umráðandi er at taka undir við protokollini og virka fyri og samráðast fram til loysnir, eins onnur lond hava gjørt.

Samráðast kann um møguliga nýggja oljuvinnu, og hvør ið rindar tá, og samráðast kann um fiskivinnu, og hvussu umstøðurnar kunnu skipast har.

Til dømis er ein fyritøka í Noregi, EnPro, ið framleiðir tøkniligan útbúnað til innsavning av $CO^2$ frá m.a. oljufýrdum ravmagnsverkum.

Heilt upp í 80% av útlátinum frá roykrørinum kunnu savnast, so tað er ikki smávegis.

Ein treytin fyri hesum útbúnaðinum er, at hann skal standa tætt við sjógv, so her hava vit allar fyrimunir, tí øll dieselverkini ligga beint við sjóarmála.

Tað einasta sum ikki fer at bera til er at skulka sær undan, og so standa sum ein rúkandi skorðsteinur, tá ið øll hini hava tálmað egnari óneyðugari dálking.

Ein umberingin frá landsstýrinum er, at vit fyrst skulu skipa eina samlaða náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting, ið skal hava beinleiðs tilvísing til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

Hendan umberingin er ikki annað enn ílatið initiativleyst dólsknið. Talan er um eina tilráðing av tíggju, sum komu fram í eini frágreiðing frá einum arbeiðsbólki um náttúru- og umhvørvisvernd – fyri fimm árum síðan.

Ein løta av effektivum arbeiði, sum hevði tikið ein seinnapart, hevur higartil tikið meira enn fimm ár. Tað er ikki nóg góð umbering, heldur er talan um eina undanstøkking móti at taka á seg solidariska ábyrgd í heimssamfelagnum.

Tað er í tøkum tíma, at løgtingið tekur málið í egnar hendur, at løgtingið gevst við at bíða eftir rapportum.

Vit hava upp í ammur og kør av rapportum, tíðin er komin til at taka politiskar avgerðir – og her er so ein avgerðin, sum hevur bráðskund.

Tjóðveldisflokkurin vónar, at tingið tekur seg saman, og viðtekur uppskot okkara um Kyoto-protokollina.

# SMS bjóðar inn til teknikapping




TÍÐINDASKRIV

Tað skal vera stuttligari hjá børnunum at koma í SMS. Umframt at vit fara at gera spælipláss til børnini, skulu vit eisini hava eitt fitt og elskuligt SMS-djór.

SMSi er eitt fitt og elskuligt djór, sum børnini ikki kunnu annað enn vera góð við.

SMSi býr, etur og svevur í SMS.

Børnini kunnu hitta SMSa í SMS.

SMSi brúkar handlarnar í SMS.

SMSi hevur sítt egna pláss á SMS-heimasíðuni.

Hvussu SMSi sær út, lata vit børnini í Føroyum avgera. Vit skriva út eina teknikapping, og vit vóna at fáa tekningar frá øllum børnunum í Føroyum.

Teknikappingin byrjar 5. februar og endar 5. mars 2007.

Høvuðsvinningurin er 10.000 kr.

Millum innkomnu tekningarnar verða tríggjar PlayStation frá Expert burturlutað.

# Kaldari næstu dagarnar

Nú um vikuskiftið vikuskiftið er klókt at finna sær tey heitu klæðini framaftur. Men regnskjólið skal ikki goymast burtur. Veðurmaður okkara, Petur Skeel Jacobsen sigur, at teir næstu dagarnar verður eitt sindur kaldari, men tað avfallinum slepst ikki undan. Og vit kunnu vænta bæði regnæl, vátasletting og vátasletting.

Í morgin, leygardagin verður framvegis útsynningur, men hann hækkar og vit kunnu vænta okkum regnæl og seinni vátasletting. Hitin verður ímillum 3 og 6 stig.

Men sunnudagin verður stívt andøvsgul av vestri, men um kvøldið hækkar hann upp í norðan og tá kunnu vit vænta okkum kavaæling og hitin verður beint omanfyri frostmarkið. Sum frálíður veksur vindurin nakað.



Mánadagin verður hvassur vindur av norði og kavaælingur og hitin verður um frostmarkið. Seinni lækkar hann niður í eystan og sami hiti, kanska fer hann beint upp um frostmarkið.

Týsdagin og mikudagin verður landnyrðingur, men hann minkar vindin og vit kunnu vænta sól, men eisini kavaæl.

Annars kann sigast, at í januar hevur miðalhitin verið 3,5 stig, men januar í ár hevur verið eitt hálvt stig lýggjari, ella 4 stig í miðal.